LANDSROYND 6. FLOKKUR

APRÍL 2012

Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

45 minuttir



*Skulin.fo - myndasavn. Myndatakari John Berg*

| Navn: | Flokkur: |
|---|---|
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Tú kanst skriva við blýanti.

**Til nælmingin**

**Les tekstin og svara spurningunum**

Per er 13 ára gamal. Hann býr í einari miðalstórari føroyskari bygd. Hann gongur í 6. flokki í heimbygdini. Tey eru bert 13 næmingar í flokkinum, 8 dreingir og 5 gentur.

Heima hjá Peri eru tey seks fólk í húsi. Foreldrini og so trý onnur systkin. Per er næstelstur, trý ár yngri enn eldra systirin.

Per fæst við ymiskt eftir skúlatíð, m.a. sparkar hann fótbólt, er á floti, spælir teldu, syngur í kóri, flettir, gongur á fjall, og so tað, honum dámar best, at fiska síl.

Viðhvørt er hann saman við vinmonnunum, tá ið hann stuttleikar sær, men tá ið hann fer at fiska síl, er hann sum oftast bara saman við pápa sínum.

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu gomul er eldra systir Per?**

14 ár ________

16 ár ________

15 ár ________

**Hvussu nógvir dreingir eru í flokkinum hjá Peri?**

8 dreingir__________

5 dreingir _________

13 dreingir ________

**Hvat dámar Peri serliga væl at gera?**

svimja________ fiska síl__________ spæla trummur_________

Per fer nú at siga frá einum av sínum mongu útferðum saman við pápa sínum:

Eg hevði akkurát fingið summarfrí. Pápi hevði nú í longri tíð tosað um at royna eydnuna á einum av teimum fjarskotnu føroysku vøtnunum. Eg og systkinabarnið, Anna, ið var komin at ferðast úr Danmark, vóru sjálvandi spent at sleppa við, men vit vistu, at tað fór at verða ein strevin gongutúrur, tí pápi gekk altíð so skjótt, tá ið farið varð til fjals.

Mamma segði, at hann fór "yvir um ánna eftir vatni", tí í heimbygdini eru góðir veiðimøguleikar eftir sílum. Bæði á sjógvi og á vøtnunum. Pápi flenti og segði, at "fagrast eru blómurnar, har ringast er at ganga".

Anna hevði ofta biðið lovað sær við at fiska, so eg helt, at nú skuldi hon sleppa.

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu eru veiðimøguleikarnir í heimbygdini?**

hampiligir ___________ góðir ___________ vánaligir ___________

**Nær fara tey at fiska?**

í desember___________ í juni _________ í apríl __________

**Hvør árstíð er hetta?**

heyst ___________ vetur ___________ summar ___________

Tað tók okkum eina góða løtu at koyra ávegis til vatnið. Eg má viðganga, at vit vóru ikki sørt spent, hóast eg stúrdi eitt sindur fyri at ganga niðan brekkuna til vatnið. Tí, sum eg segði í áðni, pápi hevur tað fyri at fara í "sjeymílaskógvarnar", tá ið farið verður til fjals.

Vit gingu niðan norðureftir, og tað mundi taka okkum eini trý korter at ganga niðan til vatnið.

Eg hevði ilt við at skilja, at eitt vatn kundi liggja so ovarlaga millum tey brøttu fjøllini, men so áðrenn eg visti av, var tað har. Tað var fínasta veður, ongin vindur.

Vatnið var á stødd við ein fótbóltsvøll, ella kanska knappliga tað. Har var ikki eitt menniskja at síggja, bert onkur nývaknað ær og so ein gásaflokkur, sum eftir øllum at døma hevði nógv at tosa um.

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu langa tíð tók tað at ganga til vatnið?**

ein tíma __________ uml. 45 minuttir __________ tveir tímar _____

**Vóru nógv onnur fólk við vatnið?**

trý onnur __________ ongi onnur ____________ fimm onnur _________

**Hvussu stórt var vatnið?**

sum ein hondbóltsvøllur __________ sum ein fótbóltsvøllur __________

sum ein tennisvøllur ___________

**Hvørji djór sóu tey har uppi, tá ið tey komu niðan?**

ross og seyð ___________ seyð og neyt ___________ gæs og seyð __________

**Hvar lá vatnið?**

niðri við sjógvin ___________ millum tey brøttu fjøllini __________

uppi á einum fjallatoppi ____________

Vit hugdu eina løtu at hesum vakra staði, áðrenn vit settu okkum at fiska. Eg fann mær eitt lítið nes á eystursíðuni. Vatnið var grunt har á leið, men einar seks metrar úti var marbakkin[1]. Eg egndi[2] við makreli og brúkti flot[3]. Pápi segði, at fiskurin ferðast í marbakkanum, so umráðandi var at hava beituna[4] har.

Anna setti seg nakað frá mær við tráðuni. Hon egndi eisini við makreli.

Tá ið vit komu til vatnið, var ikki eitt lot, men nú var eitt lítið fleyr komið norðaneftir. Hetta gjørdi, at flotið fór rekandi allan vegin fram við marbakkanum, men her hendi kortini einki. Eg sá, at pápi hevði sett seg nakað syðri og sat nú so tolin og bíðaði. Hann brúkti maðk til agn, sum hann altíð hevur trúð uppá.

---

1 Brattur bakki á botni
2 Krøkti agn á húkin
3 Lítil boya
4 Agnið

**Set x við rætta svarið.**

**Hvat slag av agni brúktu tey?**

sild og rækju ______________

rækju og krækling _____________

maðk og makrel ___________

**Hvar sat Per og fiskaði?**

á vestursíðuni ___________

á eystursíðuni ___________

á norðursíðuni __________

**Hvar sat Anna?**

hjá pápanum ___________

hjá Peri _____________

nakað frá Peri _____________

**Hvar sat pápin og fiskaði?**

syðri _____________

vestari __________

norðari __________

**Hvussu var veðrið, tá ið tey komu til vatnið?**

ikki eitt lot ______________

stormur __________

frískur vindur __________

**Hvussu bleiv veðrið?**

kavarok ___________

hvassur vindur ____________

eitt lítið fleyr ___________

Vit høvdu nú sitið einar tveir tímar uttan at hava sæð nakað sum helst til nakað lív. Hetta var eg ikki vanur við, tí har heima á vatninum sóust síl alla tíðina í vatnskorpuni. Eg var so smátt farin at ótolnast, men tá hendi okkurt.

Flotið hjá Onnu, sum var rikið einar tveir metrar út um marbakkan, fór undir. Eg helt ondini, sá tað síðani koma undan aftur. Ilskaðist, men so varð tað aftur burtur, og nú gekk tað skjótt fyri seg. Dorgin[5] táttaðist[6] í einum rykki og rann við fullari ferð út.

Sílið setti ferðina alsamt upp og royndi tað, sum tað var ment, at sleppa niður í dýpið. Har var eitt at gera, tað var at lora út, tí annars slitnaði dorgin.

Einar hálvtrýss metrar var sílið nú úti og hevði hug at steðga. Anna vant spakuliga inn, heilt inn til marbakkan, so setti tað á aftur og leyp sjóleyst einar tvær ferðir uppúr. Nú sá eg, at hetta var eitt ordans eitt.

Tað var nú aftur niðri í dýpinum, men tað sást á tráðuni, at tað so smátt fór at møðast.

---

5 Snørið á tráðuni

6 Strammaðist

**Set x við rætta svarið.**

| **Hvussu langt út fór sílið?** | **Hvar tók sílið?** |
| --- | --- |
| einar 30 metrar___________ | uml. 2 metrar úr marbakkanum ___ |
| einar 50 metrar ___________ | uml. 2 metrar úr landi ___________ |
| einar 5 metrar_____________ | í marbakkanum ________________ |

| **Hvussu ofta leyp sílið uppúr?** | **Hvussu var sílið til støddar?** |
| --- | --- |
| 2 ferðir ____________ | lítið ___________ |
| 1 ferð _____________ | sera stórt _________ |
| 4 ferðir ____________ | hampiligt ____________ |

Anna vant nú spakuliga inn, og so spenti sílið á aftur eina stutta løtu, men nú var tað av álvara farið at møðast. Vit sóu stertin koma hálvan undan, tá sóu vit veruliga støddina á sílinum. Eg royndi at koma mær niðan á eina høvd[7] fyri betur at síggja niður í vatnið. Pápi var nú komin at forvitnast. Eg sá, at hann smíltist.

Einir 10 minuttir gingu afturat, áðrenn sílið gjørdi landgongd. Pápi tók um stertin og bar tað upp á turt. Einar tretivu tummar[8] mundi tað vera, helt hann.

Anna og eg sótu nú og hugdu at hesum vakra síli. Tað var dimt brúnt við reyðum blettum, og eftir kjaftinum at døma var tað rognafiskur[9].

Pápi spurdi meg nú, um eg skilti orðini "fagrast eru blómurnar, har ringast er at ganga". Eg segði einki, men nú skilti eg hann.

Vit sótu har einar tveir tímar afturat. Eg fekk tvær maðkapirrur[10], og tað var tað.

Annars var fitt av kombikkum fram við landi. Tey mundu sikkurt fjala seg har fyri teimum stóru fiskunum.

---

7 Ein lítlan bakka
8 Ein tummi er uml. 2,5 cm
9 Kvennfiskur (ein hon)
10 Maðkapirra er eitt lítið síl

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu nógv síl fingu tey tilsaman?**

3 ______________

1 ______________

5 ______________

**Hvussu stórt var sílið?**

millum 60-90 cm __________

millum 20-50 cm __________

millum 100-130 cm __________

**Hvussu vorðið var sílið?**

blankt við svørtum blettum __________

dimt brúnt við reyðum blettum __________

gult við reyðum blettum ____________

**Hvat kyn var fiskurin?**

rognafiskur ___________

geldfiskur ____________

siljafiskur ____________

**Hvat annað slag av fiski sást í vatninum?**

laksur __________  kombikk _________  állur ____________

Sílið bleiv fryst ókruvt, tí pápi segði, tað helt sær betur í frystiboksini soleiðis.

Hann ætlaði at roykja tað til jóla, og so tosaði hann eisini um at fáa høvdið kannað á Havstovuni, tí tað var ikki á hvørjum degi, slík síl fingust.

Eg hevði mest sum gloymt alt um hetta góða síl, tá pápi rópti meg niður í kjallaran. Har lá tað, sílið, skorið í tvey nosslig fløk. Fiskurin var reyður sum á laksi. Tað kom helst av, at krabbadýr vóru í vatninum.

Orsøkin til, at pápi rópti meg niðurundir, var tann, at hann fann eitt annað síl í maganum á hesum stóra sílinum. Eitt síl uml. 4 tummar til longdar. “Hvør av øðrum liva má”, segði pápi og visti at siga frá øðrum slíkum sílum. Tey verða kallað “kannibalar” og vaksa sera skjótt.

Anna, sum hevði fingið hetta góða síl, var langt síðan farin til Danmarkar aftur, so ein dagin eg og pápi fóru til Havnar, høvdu vit høvdið við. Vit fóru út á Havstovuna við tí, har ein kona undrandi hugdi at hesum grefliga kjafti.

Tað gekk ein vika ella kanska tvær, so kom bræv frá Havstovuni:

Tórshavn, t. 6. januar 2012

Góðu Anna og Per.

Takk fyri høvdið, tit góvu okkum at kanna. Vit hava nú kannað roðsluna á uggunum, og eftir øllum at døma er sílið 13 ára gamalt.

Hetta er um at vera met fyri vatnasíl, bæði hvat stødd og aldri viðvíkur.

Blíðar heilsanir

Hanna Hansen, fiskifrøðingur

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu gamalt var sílið?**

13 ár___________ 10 ár ___________ 12 ár ____________

**Hvar goymdi pápin sílið?**

Í hjallinum __________

Í frystiboksini _________

Í køliskápinum ________

**Hvussu skuldi sílið etast?**

kókað ___________

steikt ___________

roykt ___________

**Hvar varð sílið kannað?**

á flakavirkinum ___________

á Havstovuni _____________

í skúlanum _______________

**Hvussu long var maðkapirran, sum lá í maganum á sílinum?**

uml. 10 cm _____________

uml. 5 cm _____________

uml. 15 cm _____________

Eg má viðganga, at mær dámar betur at fiska síl heldur enn at eta tey, men eru tey væl tilgjørd, er talan um góðan mat.

Síl kunnu etast á ymsan hátt. Her er ein uppskrift við stoktum síli.

Uppskriftin er endurgivin leysliga úr "Góðaráð" hjá Jonhild Henriksen.

**Steikt síl ( 4 fólk)**

1 kg av síli

2 egg

4 súpusk. av raspi

1 súpusk. av salti

**Sósin**

30 g av smøri

1 dl av vatni

1,5 dl av róma

2 leykir

2 tsk. av karri

2 súrepli

1 bótarmola

salt

**Mannagongd:**

- Vaska sílið og skrava roðsluna av
- Sker tað í hóskandi petti
- Píska eggini við gafli
- Blanda salt upp í raspið
- Roða sílið í eggunum og vend tí í raspinum
- Steik tað á pannuni

**Sósin:**

- Smelta smørið í eini grýtu og koyr karri í.
- Flys og sker leykin smátt og koyr í grýtuna at kóka í 5 min. , ikki brúnka.
- Koyr so vatnið, bótarmolan og róman í og flys og rív súreplini í.
- Lat hetta so koma upp á kók.
- Ger ein javning av hveitimjøli útá, um sósin er ov tunn.
- Koyr salt í, um neyðugt er.

**Set x við rætta svarið.**

| **Hvussu nógv súrepli skulu til 6 fólk?** | **Hvussu nógv kg av síli skulu til 6 fólk?** |
|---|---|
| 5 ___________ | 4 kg _____________ |
| 3 ___________ | 1,5 kg ___________ |
| 6 ___________ | 3,5 kg ___________ |

| **Hvussu leingi skal leykurin kóka?** | **Hvussu nógv smør skal brúkast til sósina, um 6 fólk eta?** |
|---|---|
| 5 min. ____________ | 30 g av smøri ___________ |
| 10 min. ___________ | 60 g av smøri ___________ |
| 7 min. ____________ | 45 g av smøri ___________ |

**Les spurningarnar niðanfyri væl. Les síðani tekstin á síðu 16 og 17 og svara spurningunum.**

**Set x við rætta svarið.**

**Hvussu long gerast vatnasíl?**

Sjáldan longri enn 65 cm __________

Sjáldan longri enn 85 cm __________

Sjáldan longri enn 40 cm___________

**Hvussu nógvar píkar hevur kombikkið á bakinum?**

2 _____________

3 ____________

5 ______________

**Hvussu long kunnu kombikk gerast?**

Uml. 18 cm ___________

Uml.  8 cm ___________

Uml.  16 cm ___________

**Í gýtingini verða siljafiskarnir:**

grønir undir búkinum ___________

reyðir undir búkinum____________

bláir undir búkinum ____________

**Vatnasíl**



Vatnasíl Myndatakari: Peter W. Pattison

Í Føroyum verða tey størstu vatnasílini sjáldan longri enn 65 cm. Áarsílini væl minni, tey stóru kanska um 40 cm.

Liturin: Sílini eru broytilig í liti, alt eftir umstøðunum.

Tey stóru vatnasílini kunnu líkjast sjósílunum á liti, um enn nakað kámari, men vanliga eru vatnasílini brúnlig við reyðum blettum og við hvítum ringi um blettirnar.

Áarsílini eru brún um bakið, við blonkum síðum og gullig, rómalitt undir búkinum. Blettirnir á síðuni eru svartir og reyðir.

Sjósíl, vatnasíl og áarsíl er sami fiskur, ið bert hevur ymiskar liviumstøður.

**Kombikk**



Kombikk Myndatakari: ókendur

Kombikk verða sjáldan longri enn 8 cm. Tey eru at finna í fjørum, áum, vøtnum, ósum, pollum og á firðum. Stundum eru tey eisini til havs.

Kombikkið er silvurgrønt og viðhvørt svart á bakinum, silvurblankt á síðuni og hvítt undir búkinum.

Í gýtingini eru siljafiskarnir[11] reyðir undir búkinum, meðan rognafiskarnir eru gulir undir búkinum.

Kombikkið hevur tríggjar spískar píkar á bakinum, og undir búkinum eru tveir píkar.

Kombikkið finst víða um, í Norður Amerika, í Asia, og Evropa

11 Kallfiskur (ein hannur)

## Skriva ó fyri ósatt og s fyri satt.

| | |
|---|---|
| Per fiskaði sílið | ___________ |
| Anna býr í Norra | ___________ |
| Peter W. Pattison tók myndina av sílinum | ___________ |
| Hanna Hansen sendi brævið frá Havstovuni til børnini | ___________ |
| Sterturin bleiv sendur til Havstovuna | ___________ |
| Per eigur eina eldri systur | ___________ |
| Anna og Per eru í slekt | ___________ |
| Sílið var ellivu ára gamalt | ___________ |
| Sílið varð fiskað í 2011 | ___________ |
| Hanna Hansen á Havstovuni er lívfrøðingur | ___________ |
| Uppskriftin upp á steikt síl er úr bókini "Góðaráð" | ___________ |
| Vit kenna vektina á stóra sílinum | ___________ |
| Siljafiskur er ein kallfiskur | ___________ |
| Ein tummi er uml. 4 cm | ___________ |
| Eitt flot er tað sama sum ein boya | ___________ |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

Prent: Føroyaprent